Eyðun Gaard, skúlaleiðari á Sernámsdeplinum:

# Endiliga hendir okkurt

**– Starvsfólkini her á Sernámsdeplinum eru sera glað um, at okkurt nú endiliga hendir á økinum. Vit hava verið forsømd í áratíggjur, og tí er tað at gleðast um, at vit endiliga eru sett á dagsskránna aftur. Tað sigur Eyðun Gaard, ið virkar sum skúlaleiðari á Sernámsdeplinum**

SERNÁMSDEPILIN
*Eydna Skaale*
*Eydna@sosialurin.fo*

– Sjálvsagt hava vit ymiskar holdningar til broytingina, hetta eru álvarsligar kollveltingar, talan er um. Men sum heild eru vit ógvuliga fegin um, at okkurt hendir á økinum. Og at tað er lagt í eina tíðarrammu. Ikki bara leys lyfti.

Eyðun sigur, at tey síggja broytingarnar sum nakað positivt, og at tey ganga hesum ímóti við opnum sinni.

– Tað er uppá tíðina, at alt verður lagt í fastar rammur her úti. Vit hava ligið í lógloysi í áratíggjur og einki er hent. Tað kann man hvørki bjóða næmingum, foreldrum ella lærarum. Tí síggja vit hetta sum nakað ógvuliga positivt, sigur hann.

Hann sigur tað vera gleðiligt, at okkurt nú endilig verður gjørt av tí, sum álitið um Sernámsdepilin staðfesti í 2001.

– Álitið hevði kostað sera nógv, um tað skuldi verið ført út í lívið bókstaviliga. Tað hevði nokk ikki verið møguleiki at fingið fíggjarligan uppbakkning. Spurningurin er so, um tað verður politiskur vilji til at veita fígging til hetta nýggja uppskotið, sigur Eyðun.

Hann heldur annars, at tað er sera positivt at decentralisera skúlan, soleiðis, at børnini kunnu fáa serhjálp so nær við heimið sum gjørligt.

– Tað er ein stórur partur av at fáa tey integrerað í samfelagið, at tey sleppa at vera heima, heldur Eyðun.

– Skipanin við at hava serstovur runt um landið, sum verða stýrdar centralt er sera góð. À hendan hátt slepst undan at nakar dettur burturímillum í eina grázonu, sigur hann.

– Men sjálvandi, hetta kostar nógvar pengar, so nú fáa vit at síggja hvussu verður, sigur Eyðun Gaard at enda.

# Sernámsdepilin umskipast

**Í langa tíð hevur sernámsdepilin verið niðurprioriteraður. Depilin, sum skal taka sær av øllum teimum við serligum tørvi, hevur ikki megnað at arbeitt til fullnar undir verandi umstøðum. Skiftandi stjórar, lítil peningajáttan, slitnir skúlahentleikar og overvað arbeiðsfólk hevur verið gerandiskostur á Trøðni. Men nú er ætlanin at fara undir arbeiðið at bøta um korini**

SERNÁMSDEPILIN
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*




Poul Nolsøe á mentamálaráðnum sigur, at arbeitt hevur verið við eíni loysn til sernámsdepilin leingi. Nú verður so uppskot lagt fram um at broyta bygnaðin á skúlanum. Sernámsdepilin og skúlin á Trøðni skulu eftir ætlan ikki vera ein og sami stovnur longur, men skulu skiljast sundur og verða tvær eindir, óheftar av hvørji aðrari.

– Sum er, fungerar skúlin ikki sum hann skal. Skúlin á Trøðni, sum hevur til uppgávu at undirvísa børnum og ungum við serligum tørvi, er lagdur undir Sernámsdepilin, sum skal taka sær av og ráðgeva øllum við serligum tørvi. Hendan samanleggingin gongur út yvir skúlan, og tískil útyvir undirvísingina. Fyrsta og fremsta uppgávan verður sostatt forsømd, vegna bygnaðin á deplinum. Hetta er nú ætlanin at fara undir at broyta, sigur Poul Nolsøe.

## Broytingar

Sum skilst, er ætlanin at skilja skúlan á Trøðni og sernámsdepilin sundur, so teir verða tvær sjálvvirkandi eindir. Síðani skal eitt skúlastýri setast, har foreldur at børnum við serligum tørvi koma at hava nógv at siga. Ein skúlastjóri verður settur, sum kemur at virka beint undir landsstýrismanninum. Skúlin skal býtast upp í deildir, har deildarleiðarar koma at hava høvuðsábyrgdina. Fleiri fólk skulu setast, serliga sálarfrøðingar. Ætlanin er at seta eina nevnd at kanna, hvussu hetta best verður skipað.

– Ætlanin er eisini, at fáa nakrar serstovur ella sertænastueindir kring alt landið. Hesar eindir skulu virka í samstarvi við skúlan á Trøðni og skulu m.a. vera ráðgevnadi. Á hesar stovur skal fólk setast í starv, t.d. er tørvur á fleiri sálarfrøðingum. Vit ætla at savna fakbólkar kring landið, og fáa hesar at samstarva við serstovurnar, greiðir Poul Nolsøe frá. Hetta fer at gera sítt til, at børnini á bygdunum ikki verða noydd at fara til Havnar, men kunnu fáa hjálp og ráðgeving nærri heimbygdini.

Hann sigur, at arbeitt verður fram ímóti at fáa eina heildarætlan til børnini við serligum tørvi, so foreldrini ikki noyðast at farta runt millum ymsar stovnar við børnunum.

– Tað hevði verið ynskiligt at fingið eina heildarætlan fyri barnið, sum er fyri allan dagin í eitt longri tíðarskeið. Soleiðis at foreldrini vita akkurát hvar barnið er og hvat tað ger. Tað fara vit at royna at áseta við lóg. Tað hevði gjørt gerandisdagin tryggari hjá bæði foreldrum og børnum, sigur hann.

## Væl móttikið

Poul Nolsøe greiðir frá, at mentamálaráðið hevði ein kunnandi fund um ætlanina úti á sernámsdeplinum mikudagin, og at ætlanin tyktiskt verða væl móttikin av starvsfólkinum har.

– Vit ætla ikki at smoyggja nakað um høvdið á teimum, og tískíl verða allar broytingar gjørdar í samráð við starvsfólkið á Sernámsdeplinum, leggur Poul dent á.

Hetta verður sum skilst eitt stórt stig at fara undir, tí nógvir partar skulu semjast áðrenn nakað kann henda á økinum. Bæði tað almenna, kommunurnar og mentamálaráðið skulu samstarva, um ætlanin skal kunna setast í verk. Síðani skal uppskotið gjøgnum tingið og hetta verður væntandi ikki fyrr enn um heystið 2005 ella 2006.

– Nógv kanningararbeiði og nógv nevndararbeiði skal gerast áðrenn ítøkiligu ætlaninar kunnu stingast út í kortið, og so skal játtan fáast úr tinginum, so hetta er ein langtíðarætlan, sigur Poul Nolsøe at enda.

Í 2002 kom út eitt álit um hvat skuldi gerast við Sernámsdepilin, og eru hesar nýggju ætlanir í tráð við hetta álitið.

# Gávan frá føroyingum er handað

**Týsmorgunin vóru føroysku klæðini handað krúnprinsaparinum. Tað var Trúgvi Johansen, sendimaður á bryggjuni, sum var til audiens og gav parinum brúðargávuna úr Føroyum**

KRÚNPRINSA-BRÚDLEYP
*Eydna Skaale*
*Eydna@sosialurin.fo*









Soleiðis síggja tey út, føroysku klæðini, sum krúnprinsaparið týsmorgunin fekk í brúðargávu frá føroyingum.

Nógvar hendur hava verið um arbeiðið. Astrid Andreasen hevur við góðari hjálp frá dóttrini Katrin, teknað mynstrið til fyriklæðið og turriklæðið hjá Mary og til vestin hjá krúnprinsinum. Astrid hevur eisini broderað. Umframt hetta, hevur hon eisini teknað silvurið til búnan hjá komandi brúðurini. Bæði mynstrið á fyri- og turriklæði, vesti og silvuri, mynda sjálvsomu føroysku blómuna fjallabrúður. Jenny Simonsen hevur prikkað mynstrið og frynsað turriklæðið. Poula Sørensen hevur seymað fyrri- og turriklæði.

Silvurið er smíðað hjá Niels L. Arge. Mynstrið á silvurinum hjá henni er sjálvsamt, tí umframt at vera einasta eintak, so hava bæði brosjan og belti ein lítlan grønan stein í.

Hosur og troyggju til hansara hevur Hanna Jacobsen í Sørvági bundið, meðan Elsa Paturson hevur bundið troyggjuna til hennara.

Løgmansskrivstovan hevur vent sær til tær, sum hava virkað klæðini og bílagt arbeiðið.

Og týsmorgunin var so úrslitið av nógva stríðnum givið parinum. Einki hevur tó verið at frætt um, hvussu gávan varð móttikin.



WesternGeco:

# Halda seg framat at loysa basaltknút

**Við nýggjastu tøknini ber betur til at síggja niður gjøgnum basaltið og bjóðar WesternGeco, sum gjørdi fyrstu seismisku kanningarnar undan 1. útbjóðing, seg fram til at loysa basaltknútin. Nú er so eftir at okkurt felag setir borin í basaltið**

OLJURÁÐSTEVNA
*Jan Müller*




*Phil Schearer, marknaðarstjóri hjá seismikkfelagnum WesternGeco : -Okkara royndir við at brúka lágfrekvens í seismikkinum ger tað møguligt at síggja betri gjøgnum basaltið*

*Mynd Jan Müller*

Millum mongu útlendsku luttakarar á oljuráðstevnuni í Norðurlandahúsinum vóru umboð fyri fleiri altjóðan seismikkfeløg, teirra millum tveir gamlir kenningar frá føroyska landgrunninum, nevniliga Western og Geco Prakla. Hesi feløgini eru í dag eitt felag men arbeiddu hvør í sínum lag, tá farið av álvara varð undir at skjóta seismikk á landgrunninum undan 1. útbjóðing. Western stóð fyri tí stóra seismiska kanningarprojektinum miðskeiðis í 90-unum, sum hevði til endamál at rudda slóð fyri tí fyrstu útbjóðingini.

Hesaferð hevði eitt av WesternGeco umboðunum framløgu á ráðstevnuni og varð eisini eitt stórt seismiskt kort av føroysku undirgrundini lagt á gólvið í Norðurlandahúsinum. Tað eru nýggjastu tulkingarnar av einum parti av landgrunninum, har tað m.a. ber til at síggja botnin á basaltinum og somuleiðis strukturar í fláunum undir basaltinum.

Phil Schearer, sum stendur fyri marknaðarføringini av seismiskum vørum hjá WesternGeco sigur, at ráðstevnan vísti, at stórur áhugi er fyri føroyska landgruninum og er tað eisini í tráð við metingarnar hjá WesternGeco.

– Vit hava gjørt nógv arbeiði fyri oljufeløgini her og hóast fýra brunnar eru boraðir, og teir fyri tað mesta hava verið turrir, so finst kortini ein framtíð á landgrunninum. Vit vóna sjálvandi at fáa nýggjar uppgávur frá oljufeløgunum, men vit hava so eisini nakað at bjóða av seismikki sigur Phil Schearer, sum leggur dent á, at tað hevur borið til at síggja betur gjøgnum basaltið við lágfrekvensum. Felagið hevur so eisini gjørt uppskot til serstakar kanningar á havnbotninum, sum eisini kunnu vera við til at svara týðandi spurningum.

Hjá WesternGeco halda tey, at verður hildið fram við miðvísum kanningum, so kann Føroyar sum land ganga eini spennandi framtíð á møti. – Vit vóna, at stór oljufund verða gjørd og vilja so bjóða okkum fram til at vera partur av hesi framtíð við okkara virksemi. Her verður so sanniliga nógv at gera, um oljufeløgini ynskja tað.

Phil Schearer heldur fyri, at nú brunnar bara eru boraðir í einum avmarkaðum øki við nærum teimum somu arbeiðsskráunum og playmodellunum, so fara oljufeløgini, tá tey seinni fara at bora gjøgnum basaltið at møta nýggjum og spennandi avbjóðingum. Fyrr ella seinni fer onkur at bora gjøgnum basaltið og finna fram til, hvat er undir har.



*WesternGeco legði fram á gólvið í Norðurlandahúsinum sera áhugaverd seismisk kort av lovandi strukturum í føroysku undirgrundini*

*Mynd Jan Müller*

# Vilja skerja Oljufyrisiting meira

SKERJINGAR
*Jan Müller*

Fíggjarnevndin ætlar at skerja játtan til Oljufyrisitingina við eini millión. Keldur blaðið hevur tosað við halda tað vera sera løgið, at Fíggjarnevndin kemur við slíkum uppskoti, stutt eftir at Oljumálaráðið er niðurlagt og eftir at landsstýrismaðurin í oljumálum staðiliga hevur víst á, at oljufyrisitingin fer ikki at vera lægri raðfest, men at man fer at brúka nógva orku uppá at fáa altjóða oljufeløg at vísa eini komandi rundu ans. Nú skilst, at Fíggjarnevndin hevur tikið avgerð um at skerja Oljufyrisitingina við eini risaupphædd, uttan so mikið sum at tosa við hvørki landsstýrismann og stjóra á Oljufyrisiting um avleiðingarnar av hesum.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður sigur, at hann sá ikki tølini frá Fíggjarnevndini, fyrr enn øll onnur sóu tey. Tvs. at hann var ikki kunnaður um, hvat nevndin fekst við, – Tá eg sá tølini gjørdi eg viðmerkingar til tey og gjørdi greitt, at tað ber ikki til, at Oljufyristingin verður so nógv skorin.Eg bað tí sum eitt minimum um at fáa eina hálva millión oman á aftur. Sakliga sæð kann man siga, at tað eiga tey at klára seg við, tí tey hava uppgávur, sum kanska fáa minni raðfesting, nú meðan uppgávur sum hava við 2. Útbjóðing at gera, hava somu raðfesting sum frammanundan.

*– Men hvat nú um tað kortini fer at mangla í?*

– Eg havi sagt, at tað er í bestu sannføring, at uppskotið fór úr landsstýrinum á sinni. Eg skal gera, hvat eg kann fyri at rætta meg eftir løgtingsins vilja, men er tað so, at tað er ikki nokk, so tilskili eg mær rætt at venda mær aftur til landsstýrismannin í fíggjarmálum við tí fyri eyga at venda sær til løgtingið.

*– Undrar tað teg ikki, at tín partamaður í Fíggjarnevndini, sum sjálvur hevur lagt stóran dent á oljutilgongdini í undanfarna landsstýri nú uttan at tosa við hvørki teg ella leiðslu á Oljufyrisiting strikar eina millión av hesum øki við einum pennastroki?*

– Eg haldi ikki, at tað er serliga umhugsið. Eg má bara staðfesta, at Fíggjarnevndin hevur gjørt nakrar uppprioriteringar á íløguøkinum. Og fyri at gera tað útreiðsluneutralt, so hevur man klipt av ymsa staðni. Men eg hevði hildið tað verið rætt, at skuldu sparingar verið framdar, so átti tað at verið landsstýrismaðurin á økinum, sum kom við uppskotinum og ikki Fíggjarnevndin. – Hóast alt má eg halda, at vit í Vinnumálaráðnum eru meira inni í rakstrarviðurskiftunum hjá hvørjum stovni sær enn hvat Fíggjarnevndin er.

Raðfestinganar á íløgusíðuni eru m.a. keikantur í Vági, kanning av tunli í Borðoynni, vegastubbi til Rituvíkar, keinkantur í Dímun osfr.





*Partamenninir, Bjarni Djurholm og Anfinn Kallsberg, eru ikki samdur um játtanir til eitt nú Oljufyrisiting*